Lexus LS 460:

# World Car of the Year 2007

**Motorjournalistar í 22 ymiskum londum hava kosið Lexus 460 LS til ársins bil í øllum heiminum 2007 millum 28 aðrar nýggjar bilar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í fjør var tað Audi A6, nú er luksusbilurin Lexus 460 LS, ið er kosin ársins bilur í øllum heiminum "World Car of the Year 2007".

Millum 28 ymiskar nýggjheitir varð Lexus 460 LS kosin ársins bilur í øllum heiminum av motorjournalistum í 22 londum.

Í grundgevingunum verður sagt, at Lexus 460 LS "útstrálar" luksus og kvalitet á ein hátt sum bilurin eisini fult út livir upp til. LS 460 er sera framkomin við t.d. auto/elektroniskari parkeringsskipan, 8-trins automatiskan girkassa sum skiftir so mjúkt at tað merkist næstan ikki. Bilurin fæst eisini í eini umhvørvisligari hybrid útgávu.

Lexus halda upp á at teir við nýggja LS 460 hava gjørt heimsins besta bil - tann fullkomna bilin, har eingin teknisk loysn hevur verið ov dýr og eingin vegur ov langur fyri at røkka teimum perfektu loysnunum.

Nýggi Audi TT varð nummar tvey og MINI varð nummar trý, meðan Mercedes-Benz E320 CDI Bluetech varð kosin heimsins mest umhvørvisvinarligi bilur. Annars er Ford S-MAX ársins bilur í Evropa 2007, og Opel Corsa er ársins bilur í Danmark 2007.



*Lexus 460 LS er kosin "World Car of the Year 2007"*

# Joan Ørting í drotningabilinum…

- Eg eri júst heimafturkomin av eini fantastiskari ferð í Føroyum. Eg var har fyri at halda ein stóran fyrilestur, og eg var simpulthen so væl móttikin, sum um eg var Madonna. Øll vistu eftir øllum at døma, at eg skuldi koma og tosa um sex, so eg var móttikin við opnum ørum og við gávum, drinks og biltúri í einum sonnum drotningabili…

Soleiðis greiðir Joan Ørting frá í síðsta tíðindabrævinum á heimasíðuni www.joanoerting.dk.

Joan Ørting koyrdi í hesum Bentley SII hjá Havnar Bilasavni, sum sæst á myndini, sum er tikin uttan fyri Nýggjustovu í Gongini í Havn, har hon eisini vitjaði. Tað var har, ið Barbara í skaldsøguni hjá Jørgen Frantz Jacobsen varð fødd og vaks upp.

Joan Ørting er sera hugtikin av hesi kvinnu. Søguligi persónurin handan kvinnuna í skaldsøguni er Beinta, eisini nevnd Illa-Beinta. Hon varð doypt Bente Christen Broberg, fødd í Nýggjustovu í Havn í 1668.




*- Jeg blev kørt runt i en kæmpe dronninge-bil, sigur Joan Ørting m. a. á heimasíðu síni. Hon var biltúr við hesum Bentley SII – sum er sami árgangur, sum Joan sjálv, frá 1960!*

